

# Frá vanligari lesibók til talgildaða lesibók

## Talgildað hava

## Jákup Eyðun & Kjartan

**Spurdómur** ..... 3
**Inngangur** ..... 5
**Fyrireiking** ..... 6

**Vit talgilda lesibókina Hervør og Høgni** ..... 7
**Talgildisgongdin** ..... 7
**Fyrireikingin til master** ..... 7
**Virknir knøttar í forritinum** ..... 12
**Myndir við ljóði** ..... 14

**Uppgávurnar** ..... 15
**At gera uppgávur** ..... 18
**MediaMixer** ..... 19

**Ummælið av Hervør og Høgna** ..... 20

**Næmingar við lesitrupulleikum og teldan** ..... 23
**Inngangur** ..... 23
**Stuðulsamboð til lesingina** ..... 25
**Stuðulsamboð til skrivingina** ..... 26
**Serligur tørvur** ..... 27
**Teldan í pedagogiska arbeiðinum** ..... 28
**Donsk kanning um telduna og næmingar við stórum lesitrupulleikum** ..... 29
**Vanlig undirvísing í mun til tillagaða undirvísing** ..... 31
**Lesiætlan** ..... 33
**KT-hjálparamboð** ..... 33

**Niðurstøða** ..... 36
**Keldur** ..... 38

# Spurdómur

## Frá vanligari lesibók til talgilda lesibók:

Her verður í fyrstu atløgu hugsað um, hvussu prosessin hjá okkum hevur gingist. Frá at vit høvdu yvirskriftina, til programmið var liðugt. Í fyrsta umfari velja vit at gera eitt einfalt programm við Mediator. Hetta tí vit vilja vísa, at øll sum hava nakað av kunnleika til Mediator uttan stórvegis trupulleikar kunnu gera brúkilig teldubaserað lesiprogramm. Vit ætla at lýsa hvussu tey ymisku uppleggini í Mediator síggja út. Eisini ætla vit at greiða frá gongdin, frá vit byrjaðu og til programmið fekk sítt endaliga skap.

## Vit talgilda lesibókina Hervør og Høgni:

Tá ið programmið er liðugt - í fyrsta umfari gera vit bert ein triðjing – sleppa næmingar at royna tað. Næmingarnir, ið vit her hugsa um, eru tungir fólkaskúlanæmingar og næmingar við serligum tørvi. Sjálvsagt kunnu aðrir næmingar og børn undir skúlaaldri brúka programmið, men hetta er sum sagt ikki beinleiðis málbólkurin hjá okkum.

Tá ið programmið er roynt, skulu vit hava ummæli av arbeiðinum. Ikki so nógv fyri at gera rættingar, men meira fyri at fáa at vita, hvussu næmingarnir taka í móti programminum, hoyra hvat lærarar halda um tað og hvat teir møguliga halda kundi verið gjørt øðrvísi.

Vit hava við talgildingini roynt at lagt okkum so nær at bókini sum gjørligt, tó eru uppgávurnar lagaðar til telduna. Vit meta, at tað ikki er neyðugt at gera eina læraravegleiðing til programmið. Vit ætla tó at gera eina vegleiðing, hvussu ein finnur runt í programminum.

## Hvørjir fyrimunir og vansar eru við talgildum lesitilfari í mun til vanligar bøkur:

Fyrimunir: Teldan fangar tann veika og fyri tann skuld eisini tann sterka næmingin.

Teldan er tolin, og troyttast ikki um næmingurin spyr upp í saman ella ikki svarðar rætt beinanvegin og tí kunnu sjálvt veikir næmingar sita í longri ella styttri tíð og fáa nakað burtur úr.

Næmingurin er munin aktivari, tá hann situr við telduna, enn tá hann situr við einari vanligari lesibók.
Programmið kann lætt tillagast til tann einstaka næmingin.
Næmingurin kann sita einsamallur og arbeiða.
Stavirnir eru rættiliga stórir, so programmið kann nýtast av sjónveikum.

Vansar: Helst skal ein telda verða pr. næming, og kann hetta verða ein trupulleiki í einum hópi.

### Teoriir sum undirbyggja, hví talgilt lesitilfar kann vera mennandi fyri okkara málbólk:

Her ætla vit at kontakta persónar við vitan um evnið, hetta fyri at fáa at vita, hvat skilagott tilfar er at finna.

## Tíðarætlan

Vit byrjaðu við einum Mediator skeiði, ið Heini Nygaard stóð fyri. Her fingu vit grundleggjandi innlit í Mediator.
*Áðrenn heystfrítíðina høvdu vit eitt prát við Heina, um tað vit høvdu gjørt.* Hetta vóru meira uppskot, hvussu talgilda uppgávan kundi síggja út.

Um 14.nov skal fyrsti parturin av talgildigini verða liðug. Hetta er uml. ein triðjingur av bókini. Vera stundir at gera meira, gera vit tað seinni. Um ikki, so er tað "triðingurin" ið verður okkara endaligi praktiski parturin av uppgávuni. Um sama mundi er ætlanin til verkætlanina liðug. *Vit hava næsta fundin við Heina*. Evnið á fundinum er uppgávan og verkætlanin. Eftir hetta verður programmið gjørt og sent út til áhugaðar lærarar.

Fyrst í komandi ári verður ummælið av programminum skrivað, og kanska verða onkrar broytingar gjørdar. Sum sagt áður hava vit lagt okkum rættiliga tætt at bókini , so vit meta tað ikki neyðugt at gera eina læraravegleiðing til programmið. Vit fara gera eina vegleiðing um, hvussu brúkarin finnur runt í programminum. Vit ætla at lýsa, hvussu tey ymisku uppleggini í Mediator síggja út. Eisini ætla vit at greiða frá , hví vit pedagogiskt valdu at broyta hesi, til tað endaligu uppgávuna. *Beint eftir nýggjár hava vit okkara triðja fund við Heina.* Evnið á fundinum er eftirmetingin av programminum.

Eftir jól fara vit at arbeiða við tí meira teoretiska partinum*: Hvørjir fyrimunir og vansar eru við talgildum lesitilfari í mun til vanligar bøkur, og hvussu kann teldan í heila tikið verða eitt aktiv hjá okkara málbólki.*

*Vit vilja finna teoriir sum undirbyggja, hví talgilt lesitilfar kann vera mennandi fyri okkara málbólk.* At enda verður niðurstøðan gjørd av verkætlanini.

### Hvørji forrit hava vit nýtt:

Audacity, Paint Shop Pro, Mediator og onnur multimedia forrit.

### Jákup Eyðun og Kjartan

# Inngangur

Á síðsta KT-útbúgvingarskeiðnum á Eiði í maimánaði 2003 gjørdu vit av, Kjartan og Jákup Eyðun, at talgilda lesibókina Hervør og Høgni, ið Hjørdis Heindriksdóttir og Olivur við Neyst gjørdu, og Føroya Skúlabókagrunnur gav út.

Tað fyrsta, ið vit gjørdu, var at spyrja skeiðshaldararnar, Frank Bach Jensen og Jytte Rasmussen, hvussu vit skuldu fara fram.

Tey vóru á einum máli um hesi punkt:

- Vit skuldu brúka forritið Mediator.
- Vit skuldu gera uppgávuna so einfalda sum gjørligt. Grundin til hetta er, at ein sum nýbyrjari ikki klárar at síggja teir teknisku trupulleikar, ið kunnu koma undan kavi, og ein kemur av somu orsøk í tíðarneyð.
- Vit skuldu práta við útgevarin um møgulig rættindi.
- Vit skuldu royna at fáa onkran at hava eitt skeið í at leggja okkum lag á at brúka Mediator.

- Vit skuldu leggja okkum eftir at gera partar av bókini heldur enn alla. Hetta tí, at ein fekk betri góðsku. Kláraði ein at gera ein part av bókini, so kláraði ein eisini at gera alla.

# Fyrireiking

## Rættindi:

Vit settu okkum beinanvegin í samband við útgevaran fyri at fáa møgulig rættindi upp á pláss og at fáa upprunatilfarið til bókina.

Rættindi eru vanliga ein sera torførur spurningur at loysa, og so var eisini í hesum føri. Vit fingu sera góða móttøku, og útgevarin vísti stóran áhuga í uppgávuni og gav grønt ljós til at fara í gongd.

Upprunatilfarið eigur útgevarin ikki sum soleiðis. Hann eigur innihaldið, men tann, sum leggur bókina til rættis, eigur rættindini til, í hesum føri, skanningarnar. Her brúktu vit alt ov nógva orku til at fáa upprunatilfarið. Vit vóru noyddir at ringja innanlands sum uttanlands, vælvildin og loyvini vóru í lagi, men tá til stykkis kom, var upprunatilfarið horvið við alla.

## Mediator og skeið:

Vit settu okkum í samband Hendrik Jacobsen, um gjørligt var at fáa hendur á Mediatorforritinum og at hava eitt skeið. Hendrik varð skjótur. Vit fingu forritið stutt eftir, og skeiðið var hildið fyrstu vikuna við skúlaársbyrjan.

Skeiðshaldarin, ið samstundis er vegleiðari okkara, er Heini Nygaard, lærari. Hann gav okkum eina stutta dagskunning um forritið, og hetta var samstundis startskotið hjá okkum. Vit kundu byrja.

## Frá vanligari lesibók til talgilda lesibók:

Her verður í fyrstu atløgu hugsað um, hvussu prosessin hjá okkum hevur gingist. Frá at vit høvdu yvirskrivtina, til forritið var liðugt. Í fyrsta umfari velja vit at gera eitt einfalt forrit við Mediator. Hetta tí vit vilja vísa, at øll, sum hava nakað av kunnleika til Mediator, uttan stórvegis trupulleikar kunnu gera brúkilig, teldutøk lesiforrit. Vit ætla at lýsa, hvussu tey ymisku uppleggini í Mediator síggja út. Eisini ætla vit at greiða frá gongdini, frá tí at vit byrjaðu, og til forritið fekk sítt endaliga skap.

## Vit talgilda lesibókina Hervør og Høgni

Tá ið forritið er liðugt - í fyrsta umfari gera vit bert ein triðing – sleppa lærarar/næmingar at royna tað. Næmingarnir, ið vit her hugsa um, eru tungir fólkaskúlanæmingar og næmingar við serligum tørvi. Sjálvsagt kunnu aðrir næmingar og børn undir skúlaaldur brúka forritið, men hetta er sum sagt ikki beinleiðis málbólkurin hjá okkum.

# Talgildisgongdin

Fyrireiking til uppgávuna:Master – virknir knøttar – mynd/tekstur/ljóð – neyvleiki - ljósmyndarøð við ljóði – uppgávur.

### Fyrireikingin til master:

Tíðin, vit settu av til henda partin, var fram til heystfrítíðina.

Vit avráddu, at tað fyrsta, vit skuldu fara í holt við, var, at vit einsæris skuldu brúka tær fyrstu tvær vikurnar at gjøgnumganga dømini í bókini, soleiðis at vit kundu fáa so nógvar ymsar royndir sum gjørligt. Hetta vísti seg at verða sera gevandi. Hetta var so grundarlagið hjá okkum, hvussu ið vit ætlaðu at gera/forma talgildingina.

Eftir hetta varð prátað aftur og fram um, hvussu vit skuldu arbeiða. Vit gjørdu beinanvegin av, at vit í útsjónd skuldu vera so trúgvir móti bókini, sum gjørligt.

Hetta innibar:

- Støddarlutfallið av myndunum skuldi vera á leið sum í bókini.
- Teksturin skuldi vera tann sami sum í bókini og við sama linjuskifti.
- Myndin skuldi skannast.
- Teksturin skuldi skrivast, ikki skannast.
- Sum navigatión til síðurnar skuldu vit hava stavtalvu, sum fylgdi síðunum í bókini.

Vit prátaðu rættiliga leingi um, hvat forritið skuldi kunna pedagogiskt. Vit vóru skjótt samdir í hesum máli, tó at vit vóru greiðir um, at okkurt kundi altíð koma afturat:

- Upplestur av teksti skuldi vera ein møguleiki.
- Trupul orð, ið vóru fleiri enn tríggir stavir, skuldu lesast upp.
- Orðini á myndunum skuldu kunna lesast upp.
- Uppgávur skuldu vera til ta einstaku høvuðssíðuna.
- Grundmasterin skuldi vera tann sami til allar síðurnar. Hetta tí at tað bleiv róligari hjá brúkaranum, og hann kom altíð at kenna seg aftur.

Síðan valdu vit okkum út tríggjar myndir og tríggjar tekstir:
Breiðastu og longstu myndina og eina mynd, ið fylti tvær síður. Tekstirnir, ið vit valdu, fylgdu ikki myndunum. Vit tóku ein langan tekst, ein breiðan tekst og ein, sum hoyrdi til, har myndin fór um tvær síður.

Vit vóru samdir um at gera ein grundmaster til hesar tríggjar síðurnar.
Vit brúktu Paint Shop Pro til at gera masterin við.

Mynd 1 

.

- Master við trimum kassum. Ein til mynd við teksti, ein til stavtalvuna og ein til navigatiónstastirnar, tað vil siga pílar, ljóð, upplestur o.s.fr. Tann fyrsti masterin var bláur við trimum kassum, sí mynd 1. Her sóu vit, at ilt var at fáa myndina inn í kassan. Tær liggjandi myndirnar vóru ov lítlar, og sum heild var plássspillið ov stórt í hesum kassa. Hinir báðir kassarnir vóru í lagi. Tó so, navigatiónspanelið stendur ov langt úti á síðuni. Best er, um tað kann standa undir myndini. Í fyrst útkasti royndu vit við ymiskum litum á masteranum, men tann blái var tann, ið okkum dámdu best, og vit hava hildið fast við henda lit.

Mynd 2. 


- Master við fýra kassum. Ein til mynd, tekst og navigatión, og ein til stavtalvu. Heldur verri nøgdir vóru vit við henda masterin. Spillið á myndaøkinum var ov stórt, teksturin var alt ov lítil í kassanum, og stavirnir ov lítlir. Navigatiónspanelið stendur upp og niður og úti á kantinum á myndini. Vit eru ikki nøgdir.

Mynd 3. 


- Master við fýra kassum. Hesa eru vit hampiliga væl nøgdir við. Spillplássið er sum í undanfarnu. Navigatiónspanelið stendur væl fyri í mun til myndina. Tekstrúturin stendur nakað kleimdur í krókinum og er ov lítil til stóran tekst.



Mynd 4.

- Master við fýra kassum. Hesa eru vit rættiliga væl nøgdir við. Bókstavapanelið stendur úti á síðuni. Hinir kassarnir standa pedagogiskt væl plaseraðir undir hvør øðrum. Og tó, spillprosentið er stórt, myndirnar verða ójavnar í stødd, teksturin er ov lítil, men navigatiónin er í lagi.



Mynd 5.

- Master við trimum kassum. Problemið er tað sama sum við hinum dømunum. Spillprosentið er ov stórt. Vit eru tó samdir um, at betri er við mynd og teksti í sama kassa. Tað gevur størri fleksibilitet. Vit eru samdir um at gera mynd 6.



Mynd 6.

- Master við tveimum kassum. Vit føla, at vit næstan eru komnir á mál. Í verandi løtu brúka vit eina upploysing við 800*600 pix. Vit spyrja Heina, um vit kunna vaksa til 1024*768 pix. Hann viðmælir ikki hesa loysnina. Grundin til henda fyrispurning er, at vit duga at síggja, at bókstavapanelið, ið er neyðugt at hava í forritinum, fyllir alt ov nógv. Av somu orsøk forðar tað okkum í at brúka plássið til fulnar í tí rætta støddarforholdinum.



Mynd 7.

- Master við tveimum kassum. Einum stórum 800*600 pix og einum hjákassa til bókstavapanelið. Loysnin er, at tá ið trýst verður á ein knøtt á bjálkanum, kemur tað ósjónliga bókstavapanelið inn í masterin og verður sjónligt. Tá ið bókstavurin er valdur, fer panelið út úr kassanum og er ósjónligt aftur.

Samanumtikið kann sigast, at henda gongdin var tann drúgvasta, læruríkasta og helst týdningarmesta í uppgávuni.

**Drúgt:**

- Fyri at fáa eina so nágreiniliga mynd av, hvussu valið av master fór at verða, vóru vit noyddir at gera hann so neyva og fullfíggjaða sum gjørligt. Myndin skuldi gerast neyv, teksturin somuleiðis, bókstavapanelið skuldi vera fullfíggjað og virkið, men til navigatiónspanelið kundu tilvildarlig ikon brúkast, men tey skuldu vera virkin. Eitt sera drúgt arbeiði, kanska einir 200-300 tímar.

**Læruríkt:**

- Í hesum partinum valdu vit at gera hvør sína síðu. Tá arbeiðið var liðugt, var tað sett saman til royndaruppgávuna. Hetta gav okkum báðum nógvar og góðar royndir. Vert er at hava í huga, at vit ongar royndir høvdu við Mediator frammanundan. Tá vit vóru komnir fram til tann rætta masterin, ið vit skuldu brúka, høvdu báðir góða rutinu í at gera arbeiðið, sum vit nú leggja fram.

**Týdningur:**

- Nú, vit líta aftur um bak, halda vit báðir, at vit gjørdu rætt at brúka tíð til at finna tann rætta masterin, bæði í sniði og í brúki. Tí hetta er/verður grundarsteinurin í uppgávuni og sæst aftur nærum allastaðni í forritinum.

## Virknir knøttar í forritinum:

Fyri at fáa royndarsíðurnar virknar, brúktu vit rættiliga tilvildarligar knøttar til navigatión. Seinni valdu vit at seta krøv til knøttarnar.

Krøvini vóru:

- Knøttarnir skuldu vera leiðbeinandi.
- Teir skuldu vera innbjóðandi.
- Teir skuldu vera týðiligir.
- Sami litur skuldi ganga aftur.

Skjótt sóu vit, at hetta vóru stór krøv. Ilt var at finna knøttarnar, so vit býttu okkum sundur. Ein fekst við uppgávuna, og hin leitaði eftir hóskandi knøttum. Leitað varð í Mediator, FrontPage og Paint Shop Pro, men vit vóru als ikki nøgdir við úrvalið. Teir kláraðu ikki fyrsta punktið at vera leiðbeinandi. Tú kundi finna nakrar, sum kláraðu fyrsta punktið, men ikki hini. Á alnótini funnu vit forrit, ið kallaðist “Knappefabrikken”, men hesir knøttar líktust alt ov nógv undanfarnu. Síðan

var farið at leita eftir knøttum á alnótini. Har funnu vit á einari heimasíðu knøttarnar, ið vit hildu hóskaðu best.
Eftir hetta gekk skjótt at fáa knøttarnar á rætta stað.

Rættiliga drúgv tíð gekk við at finna knøttarnar, ið okkum dámdi best. Ráðini eru: "set rættiliga fitt av tíð av til hetta arbeiði".

**Viðmerking:**
Í hesari gongdini mentist uppgávan til at kalla tvær uppgávur. Báðar eru nærum eins, tó undantikið navigatiónsknøttar, myndir/ljóð og vegleiðingin. Sjálvir hava vit ikki sæð hetta sum nakran trupulleika, men heldur styrki. Nú uppgávan er til ummælis og royndarkoyrd hjá um leið tólv brúkarum, vænta vit, at ummælararnir/royndarkoyringin hava dømt.

## Virknir knøttar í forritinum:

Sum heild kann sigast, at her er tað fyrst og fremst talan um royndir at brúka ymisk forrit sum hjálparforrit til Mediator. Vit brúktu Paint Shop Pro, ið er eitt myndaforrit, og Audacity, ið er eitt ljóðforrit. Hesi høvdu vit rættiliga hollan kunnleika í at brúka frá skeiðinum við Frank og Jytte, so her vóru at kalla eingir trupulleikar.
Sjálvt forritið Mediator er á hesum økinum rættiliga einfalt at brúka. Royndirnar við hesum partinum fingu vit, tá ið vit settu okkum inn í forritið, og tá ið teir ymsu masterarnir vóru gjørdir.

Sjálvt um eingir stórvegis trupulleikar vóru, so er okkurt at minnast til.

- Skanna myndirnar í góðari góðsku.
- Legg myndirnar, ið tú brúkar, í eina myndamappu.
- Ver rættiliga umhyggin, tá teksturin verður skrivaður. Royn at rættlesa so hvørt, tí heldur truplari er at rættlesa eitt talgilt forrit enn eina vanliga bók.
- Brúka eina góða mikrofon.
- Goym fílin í Wav, hetta tí at MP3 vísir seg starta nakað seint í hesum høpi.
- Goym alt í eini ljóðmappu.
- Minst til at taka trygdareintak.

Tá ið byrjað verður av álvara við Mediator, er neyðugt at goyma arbeiðið av og á. Serliga, tá okkurt nýtt skal gerast. Byrja við t.d. Uppg.1.0-1.1 … 1.9-2.0. Sjálvir gjørdu vit tann feilin ikki at

byrja á henda hátt. Úrslitið er, at ringt er at finna hesar uppgávur - onkur er burtur – hvør var fyrst og hvør kom eftir? o.s.fr.

Arbeiðsbýtið í hesum parti varð gjørt heilt einfalt. Báðir høvdu tær fyrstu tríggjar neyvu síðurnar. Síðan byrjaðu vit frá hvør sínum enda. Tá ið vit møttust, var arbeiðið sett saman til endaligu uppgávuna. Sjálvsagt var nakað av justeringum, men hetta var yvirkomuligt.

## Neyvleiki:

Tá tann rætti masterin er funnin og fyllast skal á hann, er týdningarmikið, at tær fyrstu tríggjar síðurnar verða gjøgnumarbeiddar út í minsta lut. Neyvari hesar síður eru gjøgnumarbeiddar, minni broytingar eru at gera til tær fylgjandi síðurnar. Í hesum føri er tað serliga navigatiónsparturin, talan er um. Her eru nøkur dømi:

- Tá farið verður í og úr aktivum felti, er best, um markørurin broytist frá píli til hond og frá hond til píl.
- Tá ið ein arbeiðir í forritinum og vil vísa til ávísa síðu, er best at brúka innbygdu heitini @next - @Previus - @FirstChild - @Parent o.s.fr. Hesi heiti verða margfaldað inn í næstu síðuna. Ein sleppur undan at rætta síðutilvísingina.
- Tá alt stendur, sum tað eigur, er gott at grupera, ctrl-g, ávísar partar. Tað kunnu lættliga koma eini 200 ymiskir fílar á eina síðu, so gott kann vera at grupera partar av hesum í “mappur”. Tá hetta er gjørt, ber ikki til at markera tað, ein skal arbeiða við, t.d. á einari mynd, men ein skal inn í tann ávísa “fílin”. Ikki trupult, men venjing skal til.
- Nú kann ein gruppa, t.d. eitt heilt navigatiónspanel, margfaldast í eini handavending á fylgjandi síðu/r.

## Myndir við ljóði:

Her hava vit tvær loysnir. Onnur er rættiliga teknisk, har síðurnar verða brúktar, sum vit síggja tær í okkara talgilda forriti. Tú kanst byrja á eini tilvildarligari síðu, og tá brúkarin vil gevast, kemur hann aftur á síðuna, har hann upprunaliga fór inn.

Hin er gjørd rættiliga einføld og býtt upp í fýra partar. Veljast kann, hvønn part ein vil síggja, og síðan koma myndirnar sum ein ljósmyndarøð við tekstinum upplisnum so hvørt. Tá brúkarin er liðugur, kemur hann aftur, har hann upprunaliga byrjaði í myndarøðini.

## Uppgávurnar:

Uppgávurnar í talgildu útgávuni av lesibókini ”Hervør og Høgni”eru fimm í tali:
1. Set inn, 2. Myndir, 3. Skriva, 4. Klappa, 5. Bókstavaspæl.

Innihaldið í 1, 2 og 3 skiftir, so tær passa til hvørja einstaka síðu, men innihaldið í Klappa og Bókstavaspæli broytist ikki.

Um nakað endamál skal vera við at gera talgildar uppgávur, so mugu tær geva næminginum fleiri og øðrvísi møguleikar enn vanligu pappíruppgávurnar geva.

Bara tað, at ein uppgáva er teldutøk, ger hana beinanvegin meira motiverandi fyri tann veika næmingin.

Uppgávuheftið er ofta ein sonn plága fyri veika næmingin, tilfarið sýnist ofta møtimikið, og næmingurin hevur torført við at fá blýantin at gera røttu loysnina. Teldutøka uppgávan ger næmingin meira virknan, hann torir nógv betur at eksperimentera, tí hann veit, at sera lætt er at gera rættingar. Tað er eisini nógv lættari hjá tí veika næminginum at arbeiða sjálvstøðugt, tá ið hann situr við telduna.

Nógvir av næmingunum í okkara málbólki hava sera trupult við at skriva hondskrivt, ja, ein kann í veruleikanum siga, at teir hata blýantin, ið letur ein tekst eftir seg, sum er torførur at lesa. Teir hava nógv lættari við at fáa tekst niður á pappírið, tá ið teir sleppa fram at einum knappaborði. Tá hava teir jú nógv lættari við at fáa eitt úrslit, sum teir kunnu vera nøgdir við. Eisini er møguleikin fyri at fáa tekst upplisnan gull verdur.

Alt tilfarið í uppgávunum er tikið úr bókini. Her hava vit roynt, eins og við allari uppgávuni, at liggja so tætt upp at bókini sum møguligt.

### 1. Seta inn

Um uppgávuna:

Tá ið næmingurin hevur lisið og kennir øll orðini í tekstinum, kann hann fara í holt við “Seta inn” uppgávuna. Trý orð eru at seta inn, so næmingurin kann saktans kenna orðamyndina og fáa sett orðini á rætta plássið uttan at royna seg fram. Eisini hevur hann møguleikan at skriva orðini inn. Tað er eitt sindur torførari enn at flyta orðið. Her skal næmingurin kenna orðið og duga at stava tað rætt.

Uppbygnaður:

*Grundarlagið undir uppgávuni eru variablar. Teir eru "lyklarnir", ið aktivera tað rætta úrslitið. Tá ið tú hálar í eitt orð, t.d. orðið "Ár", so verður ein variabul settur til tekstin "Ár" og aktiverar tað rætta pássið. Tá ið tú sleppur orðinum "Ár" út yvir eitt tómt pláss, verður kannað, um hetta plássið er tað, sum skuldi aktiverast. Um so er, verður eitt "ressource" startað, ið telur upp, hvussu nógv ein hevur fingið rætt, og "V"-teknið verður víst fyri rætt. Hetta ressourcið kannar eisini, um ein hevur klárað alt. Eitt (1) verður lagt afturat einum variabli hvørja ferð, vit hava gjørt rætt. Tá ið hesin variabulin hevur sama virði, sum samlaða talið av svarum, hava vit klárað alt, og ein tekstur og ein knøttur koma fram, sum vátta hetta.*

**2. Myndir**

Um uppgávuna:

Í myndauppgávuni skal næmingurin hála orð yvir á ein ávísan part av einari mynd. Er rætt hálað, so hvørvur orðið og stig koma upp í rútin í ovasta høgra horni. Hetta er góð venjing í at knýta mynd og orð saman. Næmingurin fær eina betri fatan av, hvat orðið stendur fyri. Eisini er hetta góð venjing í at nýta músina, sum næmingarnir eisini fáa brúk fyri, tá ið teir annars sita við telduna.

Uppbygnaður:

*Grundarlagið er eisini tað sama sum í "Seta inn" uppgávuni. Her er eisini ein variabul, ein "lykil", ið aktiverar tann rætta partin av myndini. Eitt, ið er eitt sindur øðrvísi, er, at ein kann síggja stigini, t.v.s. hvussu nógv ein hevur fingið rætt. Hetta verður stýrt av einum ressourci, eins og tá ið skil verður hildið á stigunum í "Seta inn" uppgávuni. Einasti munur er, at hvørja ferð ressourcið hevur lagt eitt stig afturat, so vísir tað tann broytta variabulin fyri stig í stigvindeyganum í høgra horni. Eisini her verða ein tekstur og ein knøttur vístir, tá ið ein hevur klárað alt.*

**3. Skriva**

Um uppgávuna:

Her skal næmingurin skriva tekstin av, sum hann kennir frá tilhoyrandi síðu. Fyri at fáa at vita, um rætt er, skal ein trýsta á "OK" knøttin. Fyri at fáa røddina at siga "Hatta var rætt", skal avskrivaði teksturin vera skrivaður og uppsettur júst sum hin teksturin. Um skeivt er svarað, sigur røddin: "Hatta var skeivt". Vegna ringan motorikk og vánaliga konsentratión hava nógvir

næmingar torført at fáa t.d. millumrúmini røtt, so hetta er ein góð venjing. Eisini stuðlar uppgávan upp undir lesingina.

<u>Uppbygnaður:</u>

*Henda uppgávan brúkar næstan bert eina funktión, og tað er "Hvis" funktiónin. T.v.s., at er teksturin í vindeyganum eins og hin teksturin, tá ið trýst verður á "OK" knøttin, sigur røddin: "Hatta var rætt", og "rætt" tekstur verður vístur. Um skeivt er, sigur røddin: "Hatta var skeivt" og "skeivt" tekstur verður vístur.*

**4. Klappa**

<u>Um uppgávuna:</u>

Í klappiuppgávuni skulu næmingarnir læra, at orð kunnu býtast upp í stavilsir. Eisini skulu teir finna útav, hvussu nógv stavilsir hvørt orðið (myndin) hevur. Um næmingurin klappar rætt tal av stavilsum og trýstir á rætta talið fyri stavilsir, so verður talið litað grønt og røddin sigur "rætt". Í øllum uppgávum er umráðandi, at næmingurin beinanvegin fær at vita, um hann hevur svarað rætt.

<u>Uppbygnaður:</u>

*Henda uppgávan er uppbygd sera einfalt. Tann einasta funktiónin "museklik". T.v.s. at "rætt" kassin til hvørt orð hevur hesa funktiónina. Henda funktión ger kassan grønan, vísir tekstin og spælir ljóðið. Niðast á síðuni er ein "Umaftur" knøttur, sum nullstillar øll úrslitini. Tað ger hann við at opna síðuna av nýggjum.*

**5. Bókstavaspæl**

<u>Um uppgávuna:</u>

Í bókstavaspælinum skal ein venja bókstavirnar. Tveir møguleikar eru.

Um ein trýstir á knøttin "ein í senn", fær ein ein spurning. Røddin sigur "trýst á B", og tá ein so hevur trýst á B í bókstavaraðnum, skal hann trýsta aftur á knøttin "Ein í senn" fyri at fáa ein nýggjan spurning.

Um tú trýstir á "Starta" knøttin, so sigur røddin bókstavin, og ein reyð súla telur niður. Tú mást so klára at svara rætt, áðrenn reyða súlan kemur á botn.

Klárar tú at svara, so fært tú ein nýggjan spurning, og eisini fært tú eitt stig í rútin í ovasta høgra horni. Vanliga er tað ikki so stuttligt at venja bókstavirnar, men tá ein kann fáa stig, er tað beinanvegin heilt stuttligt.

Uppbygnaður:

*Grundarlagið undir hesi uppgávuni eru ressource. Eitt ressource er til stigini, eitt til tíðina og eitt til val av bókstavi. Stigressourcið riggar á sama hátt sum stigressourcini omanfyri. Tíðarressourcið riggar á tann hátt, at tað brúkar funktiónina "egenskaber", so at tað tekur 1 frá hæddini hjá tí reyðu súluni. Í endanum á ressourcinum hevur tað seg sjálvt sum funktión, t.v.s., at tað tendrar seg sjálvt um aftur, so at súlan blívur við at minka. Ressourcið kannar eisini eftir, um súluhæddin er 0, og um so er, steðgar ressourcið forritinum og vísir tekstin "Tíðin er uppi".*

*Bókstavaressourcið er tann torførasti parturin av øllum spælinum. Tað er bara ein variabul, ið verður stillaður til eitt tilvildarligt tal í byrjanini av ressourcinum. Tað tilvildarliga talið verður millum 1 og 32, av tí at tað eru 32 bókstavir í stavraðnum. Síðani verður eitt standardljóð avspælt: "Trýst á". Síðani koma 32 "Hvis" funktiónir undir hvørji aðrari. Tær siga faktiskt bara, at "Hvis" variabulin er eitt ávíst tal, so skulu tær spæla tann bókstavin, ið har hoyrir til, og tendra tíðina. Er t.d. variabulin 1, so verður ljóðið "A" avspælt og tíðin tendrað. Nú skal ein finna tann tilsvarandi bókstavin í stavraðnum. Allir bókstavirnir hava "museklik – hvis" funktiónina undir sær. "Hvis" funktiónin tillutar eitt tal til hvønn bókstavin. T.d. hevur bókstavurin A talið 1. T.v.s., at ein kann bert trýsta á tann bókstav, ið hevur sama tal sum tað, ið variabulin í ressourcinum fekk.*

*Tá ið ein finnur rætta bókstavin, sløkkir variabulin tíðina, stillar hæddina á tí reyðu súluni aftur til standard, gevur stig, spælir ljóðið: "hatta var rætt", vísir tekstin og tendrar so bókstavaressourcið um aftur. T.v.s. at prosessin verður endurtikin.*

**At gera uppgávur:**

Tað kann vera ein long og torfør leið, frá tí at ein hevur eina uppgávu á pappírinum, til ein hevur eina brúkiliga, teldutøka uppgávu. Áðrenn farið verður undir at programmera, má ein fyrst á pappírinum finna út av, hvørjar funktiónir, ið uppgávan skal hava, fyri at hon skal rigga. So er at finna fram til, hvussu uppgávan skal taka seg út á skerminum, hvørjir knappar skulu vera, hvussu teir skulu standa, og hvat møguliga skal tendra, um rætt ella skeivt er. Fyri at programmera eina uppgávu við Mediator, má ein sjálvandi kenna nakað til forritið. Ein má vita, hvørjar funktiónir, Mediator hevur, og hvørjar eginleikar, tær hava. Hetta er kanska tað, ið er mest umráðandi, tá ið tú ætlar at programmera við Mediator, tí tá veit ein, hvat er møguligt at gera við forritinum. Fyri at læra funktiónirnar, kann ein hyggja í "hjálp", har nógv góð dømi eru. Vit halda, at Mediator er eitt sera gott forrit til at gera undirvísingartilfar við - serliga uppgávur. Tá ið ein klárar at hugsa í "Meditor-máli", ber saktans til at gera brúkiligar uppgávur. Tó er at siga um Mediator, at forritið kanska er í so professionelt til, at "vanligi" lærarin og næmingurin kunnu fáa fulla nyttu úr tí. Eitt gott alternativ til Mediator er forritið MediaMixer.

# MediaMixer:

MediaMixer hevur fleiri av funktiónunum, sum Mediator hevur, men tað er nógv lættari at brúka. Ja, sjálvt veikir næmingar kunnu arbeiða við myndum, teksti, ljóði, hotspot, filmi, knøttum o.ø. funktiónum. Ein onnur styrki hjá MediaMixer er, at allar funktiónirnar liggja í menubjálkanum. Tær nýtist ikki at fara aðrastaðni fyri t.d. at finna ljóðforrit ella fyri at redigera myndir. Eisini sleppur tú undan at halda skil á og goyma allar møguligar fílar.

**Broytingar í verandi forritum:**

Eitt alternativ til at gera alt frá grundini av, er at gera broytingar í verandi forritum. Tað er nokk illa hugsandi, at vanligi lærarin skal vera programmørur. Nógv forrit kunnu uttan nógv hóvasták broytast. Um lærarin brúkar sína pedagogisku vitan, hugflog og skapanarevni, eru stórir møguleikar í verandi forritum. Gott er eisini, um næmingarnir eisini hava ávirkan, teimum dámar t.d. væl at fáa sínar egnu myndir og tekningar við. Viðvíkjandi rættindum eru ikki teir stóru trupulleikarnir.

Nógvar fitta myndabøkur eru, sum hóska væl til næmingar við serligum tørvi, men tað knípur ofta at fáa næmingin áhugaðan at arbeiða aktivt við bókini. Her er MediaMixer eitt sera hent amboð til at talgilda lesitilfar. Ofta kann næmingurin gera ein stóran part av arbeiðinum sjálvur, sum at seta myndir inn og skriva tekstin av. Sum eina roynd hava vit talgildað bókina: **Tríggir smáir kettlingar.**

Vit skannaðu allar myndirnar og løgdu tær í mappu, so næmingurin lætt kundi finna tær. Eisini varð teksturin kliptur burturúr og goymdur. Nú var rímiliga lætt hjá næminginum, at finna myndina og tekstin og seta inn í MediaMixer. Nú slapp næmingurin at klippa myndirnar og gera tær passandi í stødd og seta tekstfelt undir myndirnar. So hvørt sum teksturin til hvørja mynd var skrivaður, varð tekstmyndin slettað. Eisini slapp næmingurin at seta nakrar taluboblur inn í myndirnar. Taluna til tekstin læs lærarin inn, eisini vórðu nøkur hotspot við talu gjørd. Í gjøgnum alla tilgongdina sóu vit ein áhugaðan og aktivan næming, nakað sum vit alt ov sjáldan síggja, tá tann vanliga bókin liggur á borðinum.

# Ummælið av Hervør og Høgna

## Royndarbrúkararnir:

Í tíðarætlanini hjá okkum skuldi uppgávan at talgilda "Hervør og Høgna" vera liðug fyrst í desember. Nakað fyri hetta settu vit ein fyrispurning fram á ráðstevnu okkara: “kt-verkætlan”, um, hvør kundi hava áhuga í uppgávuni. Afturljóð kom frá tólv lærarum. Hesir fingu fyrst í desember fløgu sendandi við teirri treyt, at vit skuldu fáa eitt lítið ummæli av talgildingini afturfyri. Hetta skuldi fáast frá hondini fyrst í februar. Vit komu út í hálvan februar, men ummælini komu eingi, undantikið eitt. Síðan sendu vit eitt uppskot til royndarbrúkararnar um, hvussu hetta lítla ummælið kundi síggja út. Ikki kann sigast, at undirtøkan var nakað at reypa av. Vit fingu eitt lítið ummæli afturat.

Tá ið vit tilvildarliga hava hitt royndarbrúkararnar á máli, lata teir sera væl at uppgávuni. Hon er nærum fullkomin! Rættiliga trupult er at brúka hetta konkret, tí ilt er at tosa um smálutir í einum slíkum túnatosi, men rákið er har.

Ein lærari hevur verið so beinasamur at tikið uppgávuna í álvara, og eru vit sera takksamir fyri hetta. Hesin lærari hevur samskift við okkum regluliga um smáfeilir við uppgávuni og hevur at enda ummælt hana.

Kundu vit gjørt hetta annarleiðis? Ilt er at meta um, helst kundi okkurt verið gjørt betri. Tað er ein veruleiki - útbúgvingarfelagar siga frá tí sama - at ilt er at fáa nakað aftur frá lærarum, ið skulu svara einhvørjum. Kanska eru teir ovbyrjaðir, ella...? Skal nakað spyrjast burtur úr slíkum, skal ein í øllum førum hava eitt samskifti gangandi partanna millum.

Vit hava valt at sett hetta ummælið, sum lærarin gjørdi, beinleiðis á prent.

## Ummæli av Hervør og Høgna:

Hervør og Høgni í skúla er heitið á nýggjari lesibók, sum kom út fyri kortum. Bókin er ætlað til byrjunarfrálæru í føroyskum í fólkaskúlanum.

Tí haldi eg, at hugskotið at gera eitt teldutøkt tilfar til bókina, er einastandandi gott, og serstakliga, tá tit hava havt næmingar við serligum tørvi við í huganum. Tit arbeiða jú báðir á Sernámsdeplinum, so tykkara áhugi á hasum økinum hevur helst elvt til uppgávuna.

Stutt fyri jól fekk eg so fløguna sendandi. Beinanvegin var eg sera hugtikin av hesum, og hetta sá sera spennandi út.

Skúlin var ikki meira enn komin í gongd eftir nýggjár, tá eg fekk eina nýggja fløgu, ið hevði nakrar rættingar á. Vit fóru í gongd við arbeiðið.
Í flokkinum eru 22 næmingar, og ein av teimum hevur serligan tørv og hevur 10 stuðulstímar. Hetta gjørdi, at vit nógvar av tímunum kundu leggja okkara arbeiði til rættis út frá tí.
Vit hava havt bólkar við uml. 6 – 7 næmingum hvørja ferð í teldustovuni, tá vit hava arbeitt við hesum, og næmingurin við serligum tørvi hevur verið við í einum bólki, og hann hevur eisini verið í teldustovuni saman við stuðulslæraranum, har teir hava sitið við tilfarinum – undir meira friðarligum umstøðum.

Eg havi sagt tað fyrr, men kann endurtaka tað aftur nú, at ta fyrsta ”reaktiónina” hjá næmingunum áttu tit at upplivað. Tað sást á teimum, hvussu glaðir teir gjørdust at síggja Hervør og Høgna á telduni. Andlitini á teimum var alt eitt stórt smíl.

Næmingar, sum møguliga høvdu ein ávísan ótta fyri tí, sum skuldi henda í teldustovuni, og teir, sum ikki vóru so álvuligir við eina teldu, vóru nú sum hamskiftir. ALLUR ÓTTI FYRI TÍ ÓKENDA HVARV, tí hetta fór heilt sikkurt at verða stuttligt. Her hevði tað ”visuella” nógv at siga. Hetta var jú kent tilfar fyri tey og økti um teirra forvitni, og ikki minst eggjaði hetta teimum til at finna út av ymiskum. Tey hugdu at myndunum, lósu okkurt, sum tey dugdu og kendu, royndu at blaða við músini, loystu uppgávur við músini, so her var longu nógv vunnið - tey fóru ”aktivt” í gongd sjálvi - motivatiónin var har…

Sjálv haldi eg, at hetta tilfarið eisini er fínur ”innfalsvinkul” til sjálva telduna. Tey upplivdu, hvat ein telda kann nýtast til. – Har kann ein lesa, skriva, leita og ikki minst fáa okkurt at vita, so alt hatta hava tey eisini upplivað við hesum.

Eitt, sum eg eisini havi sagt fyrr, var, at tá eg møtti næmingunum aftan á hetta, spurdu teir meg, nær vit aftur fóru í teldurnar at lesa um Hervør og Høgna, og teir gleddu seg til føroyskt, so har fáa tit ein fjøður í hattin frá mær - nú var tað knappliga sooo stuttligt at hava føroyskt ...
Sum frá leið, fóru tey sjálvi víðari, tey skrivaðu og loystu fleiri uppgávur. Tit hava dugað væl at gjørt uppgávurnar á ymiskum støði, øll vóru ikki noydd at lesa líka nógv, tey gjørdu tað, sum tey nú maktaðu, og ikki minst - øllum nýttist ikki at gera tað sama ... Bókstavaspælið er jú eisini gjørt

so, at tey sjálvi kunnu avgera ferðina, tey byrjaðu ”ein í senn” og til endans kláraðu tey bókstavirnar skjótari, so eisini fyri tað fáa tit rós.

Eg veit ikki, hvussu nógv eg skal skriva um sjálvt arbeiðið hjá okkum, eg havi jú leypandi sagt tykkum frá ymiskum, sum eg/vit rendu okkum í á vegnum, so eg haldi, at eg lati tað liggja.

Fyri at draga samanum, so er hetta góða hugskotið hjá tykkum at gera teldutøkt tilfar til eina ”lesibók” avgjørt vegurin fram. Skúlin er fyri øll, og hetta tilfarið er avgjørt viðvirkandi til, at onkur næmingur, ikki klárar at luttaka í tí dagligu frálæruni saman við flokkinum, fær við ein gyltan møguleika eisini at vera við. Tann vanligi næmingurin upplivdi, umframt tað, sum eg fyrr havi skrivað, at teldan eisini er til annað enn spæl o.a.

Um eg hugsi um næmingin við serligum tørvi, so hevur hetta avgjørt verið gott fyri hann. Hann hevur kunnað luttikið í hesum saman við bólkinum/flokkinum - hann hevur hoyrt tað sama sum floksfelagarnir, sæð tað sama sum teir, upplivað tað sama sum teir, og eftir sínum førimuni hevur hann eisini roynt uppgávurnar, og ikki at gloyma, so hevur hann verið saman við teimum og luttikið í øllum prátinum á teldustovuni. Hann/tey hava við hesum tískil eisini fingið eitt amboð og eina avbjóðing, sum hevur verið góð fyri allar partar.

Eg havi ongantíð havt øll í teldustovuni í senn, tí eg legði til merkis, at tey vóru sera ymiskt fyri á telduni. Ikki øll høvdu atgongd til teldu heima, og summi brúktu stóran part av frítíðini til telduspøl, mest sum ov nógva tíð, helt eg. Tí valdi eg at gera tað soleiðis, at vit vóru í bólkum, og eg havi heldur ongantíð lagt arbeiðið til rættis eftir, at øll skuldu gera tað sama. Onkur hevði brúk fyri nógvari hjálp, og onnur kláraðu næstan alt sjálvi.

Vit hava havt stóra gleði av hesum, og hetta fer at vera ein partur av frálæruni í føroyskum frameftir. Tí enn er bara ein mánaður farin síðan vit byrjaðu, og eg havi ikki viljað skundað so nógv undir tey. Vit/eg eru glað fyri at vit eru sloppin at royna hetta. Vit hava fingið sera nógv burturúr.

# Næmingar við lesitrupulleikum og teldan

## Inngangur:

Tað vil altíð vera neyðugt at lesa. Øll hava fyri neyðini at lesa eftir førimuni, og tað fer helst ongantíð at vera óneyðugt at duga tað, heldur ikki í dag, har tað visuella hevur so stóra týdning.
Eisini næmingar við toliligum ella ringum lesiførleika skulu læra at lesa, og vit skulu alsamt royna at liva upp til størru krøvini til lesiførleikan, ið samfelagið áhaldandi krevur av okkum øllum.
Krøvini til lesing eru alsamt vaksin, og serliga er vøksturin vorðin sjónligari í seinnu helvt av farnu øld. Tey vaksa enn, verða broytt og herd.
Krøvini skulu verða nádd skjótari enn skjótt. Av somu orsøk er denturin lagdur á lesiførleikan øll skúlaárini. Sjálvt um aðalmálið hjá skúlanum er næmingatillagað undirvísing, vil altíð vera so, at næmingur hevur tørv á tillagaðari lesiundirvísing.
Í miðnámsskúlunum koma fleiri og fleiri krøv. Her sæst tíðliga, at næmingar hava tørv á tillagaðari undirvísing.
Eisini seinni í lívinum er tørvur á serundirvísing, serliga sæst hetta í samband við eftir- og endurútbúgvingar.

Í einhvørjari undirvísing er tørvur á tilrættalegging, soleiðis at hin einstaki kann mennast og koma eitt stig longur.

Fyribyrgjandi átøk í barnaárunum so sum hjálp til børn, ið hava ilt við at læra at tosa, eru neyðug, men ikki er hetta altíð nóg mikið.

Partur av teim, ið hava ringt við at læra at lesa, læra tað sum frá líður og gerast vanligir lesarar. Ein annar partur vil hava ávísar trupulleikar at læra at lesa. Hesir skulu hava pedagogiska hjálp - í flokkinum ella í bólki. Afturat hesum koma tey við sera stórum lesitrupulleikum, ið skulu hava ein serligan pedagogiskan stuðul fyri at fáa ein ávísan lesiførleika.

*Eitt mál, ið er trupult at náa, er, at eingin serundirvísing skal vera yvirhøvur, serliga hugsa vit tá um lætta serundirvísing.*

*Málið fyri framman er at minka um serundirvísingina, uttan at hetta skal fáa sjónligar fylgjur fyri lesiførleikan og aðra menning.*

Aðalmálið við allari undirvísing er at gera serundirvísing óneyðuga, men hetta mál er órealistiskt, tí ein kann ikki vænta, at tað altíð ber til. Við tað at nýggj krøv verða sett fólkaskúlanum, miðnámsskúlunum og eftir- og endurútbúgvingini, verður altíð tørvur á serundirvísing onkustaðni.

Tað finst eingin einvís loysn á lesiproblematikkinum, og tað kann ikki væntast, at nøkur loysn er í væntu.

Tá ið næmingarnir møta tí formellu undirvísingini, eru teir rættiliga samansettir og ymiskir. Teir eru ymiskir, áðrenn teir koma í skúla, í barnagarð, dagpleygu og vøggustovu.

Umhvørvið hjá tí einstaka er ymiskt og vil til allar tíðir broytast. Tað, at samfelagið ikki er statiskt, ger, at nýggj krøv og mál vilja altíð vera fyri framman. Tað førur við sær, at vónirnar til førleikar broytast, og so er eisini við lesingini.

Neyðugt er at arbeiða málrættað, og er lærarin ein týdningarmikil lutur í hesum - nevniliga at vera íbirtari til, at næmingurin kann fara at lesa.

Sum oftast eydnast hesin parturin væl. Tíbetur.

## Lesitrupulleikar:

At hava lesitrupulleikar er eitt sera stórt brek í dagsins kunningarsamfelag. Ein roknar við, at øll vaksin kunnu tulka tað skrivaða orðið. Pedagogikkurin, sum segði: ”at tað gongur nokk”, átti ikki at verðið góðtikin í dagsins skúla, tá ið um lesing ræður.

Tann tíð, tá tað var nóg mikið at duga at skriva sítt egna navn fyri at sleppa at mynstra við einum skipi, er farin. Meira verður kravt av læraranum viðvíkjandi námsháttum og tilfari.

Tað er helst eingin einsíðug forkláring, hví ein ávísur næmingur hevur lesitrupulleikar, ei heldur kann ein siga, hvør máti er tann einasti rætti at hjálpa. Sjálvt um málið er sólaklárt, so eru mátarnir so ómetaliga nógvir, sum møguliga kunnu føra á mál.

Ein av møguleikunum er teldan. Ofta verður hon bert brúkt sum ein framkomin skrivimaskina, men vit vita, at hon gevur nógv fleiri møguleikar. Lærarin kann gera sítt egna talgilda tilfar, sum

kann vera meira ella minni fullkomið. Eitt dømi er okkara talgilda útgáva av Hervør og Høgna. Føroyar eru smáar, so tað verður helst sera avmarkað, hvussu nógv teldutøk undirvísingarforrit fara at verða útgivin, um ikki peningaligur stuðul er uppií. Serstakliga næmingar við serligum tørvi verða lágt prioriteraðir, tí næmingatalið er so lítið. Ein møguleiki kundi verið at tillagað útlendsk forrit til føroysk viðurskifti.

## Stuðulsamboð til lesingina:

**Syntetisk tala:**

Eyðkenni við syntetiskari talu eru:

- Hon er ikki innlisin sum orð.
- Hon er knýtt at teksti og bókstavum.
- Hon verður gjørd av telduni so hvørt.
- Hon lesur mestsum allan tekst og allar bókstavir.

Syntetisk tala er ikki ein samlað upptøka av upplesiligum orðum. Bókstavir, orð og setningar verða sett saman til talu og lisin upp um ljóðkortið í telduni. Grundarlagið undir henni er, hvat ljóð tann einkulti bókstavurin gevur, og hvussu hann ljóðar, tá ið hann verður settur saman við øðrum stavum. Aftur at hesum hevur hon eitt savn av undantøkum at stuðla seg við, og brúkarin kann eisini fáa hana at siga eitthvørt orð á ávísan hátt.

**Lesiforritið:**

Tann syntetiska talan hevur møguleika til at lesa vald orð og valdan tekst. Saman við einum lesiforriti víðkast møguleikarnir at brúka hana í undirvísingarhøpi. Alt eftir hvat brúkarin vil, kann hann fáa taluna at lesa upp bókstavir, samansettar bókstavir, orð og setningar.

Tá ið tekstur skal verða lisin á einum telduskíggja, velur lesarin, hvat skal verða upplisið, og forritið lesur. Hetta er galdandi fyri einhvønn tekst – eisini tekst við stavivillum.

Í eini skriviprosess, t.d. tá ið ein skrivar á teldu, kann brúkarin til eina og hvørja tíð fáa eitt aftursvar upp á tað skrivaða, og í upplestrinum kann hann fáa onkran stavi- og innihaldsvillu rættaða. Skrivarin kann eisini hugsa: ”Var hetta nú tað, eg ætlaði at siga?“.

**Úttalan, tann danska útgávan:**

“Sjálvt um tann syntetiska talan ikki ljóðar natúrlig, í fyrstani heldur ring at skilja, so kann hesin eintáttaði og greiði hátturin vera ein fyrimunur hjá børnum við lesitrupulleikum. Børn og ung eru trygg við, at ein telda tosar á henda hátt, heldur enn ein verulig tala”. Elbro et al., 1996.

Tað skal tó sigast, at lærarar og næmingar halda, at úttalan, tann danska er eitt sindur trupul at skilja. Hetta er helst tí, at tað er torført at endurskapa mannatalu, men veldst tó eisini um, hvat fyri syntesu, ein brúkar.

Hvussu tann føroyska verður, er ilt at spáa um. Kostnaðurin verður helst einar 5.000 - 8.000 túsund krónur.

**Digital tala:**

Eyðkennini fyri digitala talu eru:

- Øll tala verður innlisin.
- Røddin er natúrlig.
- Er avmarkað í orðamongd og hvat kann lesast upp.

Einfaldari sagt. Júst sum ein vanligur bandupptakari, tó kemur ljóði frá einari teldu.

Tann digitala talan kann býtast í tveir bólkar.

Ein við læstari talu, eins og forritið við Hervør og Høgni er dømi um. Hin er meira fleksibul. Ein stórur orðabanki verður innlisin, vanliga við cd-rom. Tá ið ein tekstur skal verða upplisin, leitar teldan í orðabankanum og orð/tekstur verða lisin. Hesin hátturin hevur fyrimunir, men bankin hevur lyndi til at vera ov lítil. Við tíðini fer tann syntetiska talan at koma í staðin.

**Stuðulsamboð til skrivingina:**

Í føroyskum høpi eru tvinnandi møguleikar.

Til skriviforritið Word er ein føroyskur rættstavari. Hesin rættar bert stavi- og prentvillur. Tann grammatiski parturin er ikki tøkur enn. Eitt sera hent amboð til at lúka tær ringastu villurnar burtur.

Hin møguleikin er eitt “prædiktionsprogramm“. Slíkt forrit verður brúkt, meðan ein skrivar, soleiðis at tað leggur seg á ein lítlan part á skerminum. Tá ið ein hevur skrivað fyrsta bókstavin, roynir forritið á einum lista at gita orðið. Er orðið ikki á listanum, so skal ein bókstavur skrivast afturat o.s.fr.

Hetta forrit kann brúkast í øllum skriviforritum og er ætlað til persónar, ið hava trupulleikar at skriva, eisini likamliga.

Hetta forrit finst ikki beinleiðis á føroyskum, men er skjótt at tillaga. Tim Wentzlau í Vági arbeiðir við hesum forriti. Teldupostadressan er tim.wentzlau@auxilior.com

**Serligur tørvur:**

Orsøkirnar til at ein næmingur hevur lesitrupulleikar, eru fleiri og samansettar. Tí hevur tann einstaki næmingurin krav uppá at fáa serviðgerð. Trupulleikarnir koma oftast til sjóndar, meðan næmingurin arbeiðir, og hevur ein tá telduna við hondina, so kann hon stuðla næminginum so mikið, at hann kann fylgja við og missir ikki sjálvsálitið.

Sama, hvør orsøkin er til, at ein hevur trupulleikar við at lesa og skriva, so hava øll krav uppá at fáa stuðul og hjálp við tí málsliga, og henda hjálpin má tillagast soleiðis, at hon hóskar til trupulleikarnar hjá tí einstaka. Hvør næmingur hevur sín tørv, og her er vert at minnast orðini hjá Torsten Husén um, at *"tað hevur minni týdning, hvussu virkin næmingurin er, heldur er tað týdningarmikið, hvat hann fær burtur úr undirvísingini."*

Arbeiðið framman fyri telduskerminum hevur nøkur ávís eyðkenni:

- motivatión
- virkni
- meira sjálvsálit – sjálvbjargni
- samansett sansaupplivilsir
- málslig kunnan – meira vitan
- veruligt samskifti
- arbeiða við flokking, strukturi og dispositión
- hava skil á heildini – betri yvirlit

## Motivatión, aktivitetur og sjálvsálit:

Hugtøkini *motivatión, arbeiði og sjálvsálit* ganga aftur í teimum psykologisku teoriunum. Tað er væl kent, at næmingar koma lættari ígjøgnum eitt arbeiði, um áhugin er til staðar.

Motivatiónin – ella áhugin – fær næmingin at arbeiða meira áhaldandi, enn hann vanliga vildi gjørt. Her kemur tann spennandi teldan inn sum ein áhugavekjandi katalysator, sum ikki bert ger næmingin forvitnan, men sum eisini megnar at halda hann virknan í longri tíð. Vit kenna skermin frá teimum mongu telduspølunum og frá sjónvarpinum, har persónurin er tann "aktivi" persónurin - hann ger av, hvat hann vil síggja, og nær hann vil broyta skermin - hetta virkar motiverandi. Harafturat kann ein so eisini eksperimentera. Tað er lætt (og loyvt) at gera feilir og at rætta, og meðan næmingurin arbeiðir, kann hann snakka hart við seg sjálvan ella diskutera við ein vinmann.

Útviklingspsykologiin sigur, at málsliga fyribrigdið ”*at snakka hart fyri seg sjálvan*” er við til at hjálpa til, tá ið uppgávur skulu loysast.

Torsten Husén sigur, at øll góð innlæring byggir á tvey stór A: AKTUALITET og AKTIVITET. Ein neuropsykologisk teori kann eisini undirbyggja aktivitetin. Konsentratión og eftiransni verða styrkt við motoriskum og málsligum venjingum. Tí eru hesar tvær grundleggjandi funktiónirnar eisini týdningarmiklar í innlæringsprosessini.

Teldan ger, at persónurin verður konsentreraður og aktivur. Tann ljósi skermurin fastheldur áhugan longri, og tað er eisini lættari at fanga tekstin á skerminum enn á pappírinum. Tað vísir seg, at ein næmingur sær nógv skjótari, um eitt orð er stavað rætt ella skeivt, tá ið tað stendur á skerminum.

Tað, at telduskermurin kann flytast, hevur eisini týdning. Kanningar hava víst, at smá børn flyta eyguni vertikalt, til tey um skúlaaldur eru ment so mikið, at tey kunna flyta tey horisontalt eisini. Vit kunnu hugsa okkum, at næmingar, sum hava vánaligan fínmotorikk og harav eisini vánaligan eygnamotorikk, hava nógv lættari við at arbeiða við einum lodrættum skermi. Sjálvur skermurin kann sostatt hjálpa nógvum næmingum til at skilja eina mynd og ein tekst og gera tað møguligt, at næmingurin so kann arbeiða víðari við evninum.

## **Teldan í pedagogiska arbeiðinum**:

Vit halda, at nógv talar fyri, at vit skulu nýta telduna saman við ella aftur at tí vanligu undirvísingini, ikki bert til næmingar við trupulleikum, men eisini til næmingar í vanliga skúlanum. Tann lýsandi litskermurin hevur stóra, positiva ávirkan á konsentratiónina.

Royndir hava víst, at teldan serliga í serundirvísingini hevur so positiva ávirkan á innlæringina hjá børnum við lesi og skrivitrupulleikum, at hon ikki kann yvirmetast. Veruleikin er ofta tann, at næmingar, eftir at hava brúkt telduna í eina tíð, uppliva, at teir **kunnu** lesa og skriva, og at teir enntá halda, at tað er stuttligt.

Teldan er eitt einastandandi gott amboð til hesar veiku næmingarnar. Yvirlæknin Morten Kraft, sum sjálvur hevur lesi- og skrivitrupulleikar, skrivar í eini grein í 1992, at ”*Gutenberg skapaði orðblindni. IBM og APPLE hjálpa okkum at sleppa av við tað.*” Hóast skemtiliga tikið til, so er kortini álvari í orðunum eisini.

Vaksandi kunnleiki til børn við stórum lesi- og skrivitrupulleikum fer við tíðini at prógva, um teldan kann verða eitt enn hentari amboð til henda næmingabólk. Eitt er tó vist, at hóast teldan kann ikki koma í staðin fyri læraran, so er hon sera góða hjálp í undirvísingini av næmingum við serligum tørvi.

## Hví fær teldan næmingin at arbeiða ?

Tað eru nógvar ymiskar ørsøkir. Teldan er "in", næmingurin er opin fyri at brúka telduna, og ein verður "týdningarmikil", tá ein arbeiðir við teldu. Møguleikarnir hjá telduni at viðgera eitt evni hevur sjálvandi týdning fyri næmingin, sum hevur trupulleikar. Hann kann arbeiða við tí tekststødd, sum hóskar honum best, tað er lætt at rætta í tekstinum, og tað prentaða úrslitið er vakurt uttan yvirstrikingar og rættingar. Næmingar viðgera skrivligu uppgávurnar øðrvísi á telduni. Teir geva sær stundir at royna ymiskar stavimátar og hugsa seg ofta fram til rætta úrslitið. Støðan er heilt øðrvísi, tá ið næmingurin arbeiðir við pappíri, blýanti og viskileðri. Ofta verður skrivað útyvir, og viskileðrið letur ofta ljót spor eftir sær. Jú veikari næmingurin er, jú ljótari er úrslitið, og hetta kann heilt einfalt taka mótið frá næminginum. Á telduni verða stavirnir bara skiftir út, og her síggjast eingi ljót spor.

Á telduni eru heldur ongar reyðar strikur. Er rætt svarað, kann teldan geva eitt fitt „bibb“, og er svarið skeivt, kann teldan kanska bert tiga ella siga okkurt annað. So kann næmingurin royna umaftur.

## Knappaborðsvenjing:

Tá ið næmingurin brúkar knappaborðið, fer hann eisini at finna runt á tí. Hann fær venjing í at kenna stavirnar og kann brúka báðar hendur. Hetta ger, at hann skrivar nógv skjótari enn við hond. Her er forritið: 10 – fingraforritið eitt sera gott amboð. Um vit hugsa ein næming, sum hevur trupulleikar við at kenna mun á b, d og p, so kann hann fáa góða venjing á knappaborðinum. Næmingurin veit, at b er niðast á knappaborðinum o.s.fr. Tá tað eru veikir næmingar, kann ein saktans brúka einar fimm minuttir av hvørjum tíma við venjingum á knappaborðinum.

## Donsk kanning um telduna og næmingar við stórum lesitrupulleikum:

Niðanfyri er prentað úrslitið av kanning millum danskar lærarar, hvat teir halda um telduna í lesiundirvísingini til næmingar við stórum lesitrupulleikum. Sjálvt um kanningin er gjørd í danska skúlaverkinum, so halda vit ikki, at svarini høvdu verið stórt øðrvísi, um hon varð gjørd í Føroyum.

| | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| Teldan sum amboð | • góð afturat<br>• gott at sleppa frá uppgávubókini<br>• næmingar tora betur<br>• stuttligt – ger undirvísingina meira varierandi<br>• næmingarnir vilja meira | • krevur meira tíð<br>• ávíst press at arbeiða við telduni<br>• ein gloymir skjótt tíðina, tá sitið verður við telduna<br>• skjótt at verða |

| | | |
|---|---|---|
| | • lættari at rætta<br>• vøkur útskrivt<br>• gevur veika næminginum hægri status<br>• stuttlig at ”duga” | hangandi í ”terpingini” |
| Hvussu ávirkar teldan næmingin | • ferð kemur á lesingina<br>• næmingurin hevur stóra framgongd<br>• minni mótstøða ímóti at lesa<br>• næmingurin er positivur yvir fyri telduni<br>• meira konsentreraður<br>• næmingurin følir seg útvaldan<br>• størri motivatión<br>• størri status<br>• meira tilætlað venjing<br>• serundirvísingarhølið er vorðið meira lokkandi<br>• hevur góða ávirkan á skriving og arbeiðsgleði | • minni tíð til lesing<br>• einki |
| Hvussu ávirkar teldan arbeiðið hjá læraranum | • hægri status<br>• viðger trupulleikarnar á øðrvísi hátt<br>• positivt – fær arbeitt við fleiri næmingum samstundis<br>• kann gera vakrar útskrivtir til aðra undirvísing<br>• arbeiðið er meira skiftandi | • einki<br>• hølistrupulleikar |

## Fortreytin fyri útbúgving:

Tað er vert at leggja sær í geyma, hvat fólkaskúlalógin í høvuðsheitum leggur dent á.

Serliga eru tað tær persónligu kvalifikatiónirnar sum: kreativur hugsanarháttur, áhugi, tillaging, at hava yvirlit, sortera og niðursjóða stórar mongd av informatión. Alt hetta er ein treyt fyri, at tann einstaki kann arbeiða kritiskt við KT.

Avbjóðingin er/verður at halda tí einstaka til, soleiðis at hann alla tíðina er við í kunningarstreyminum. Afturat hesum er tað neyðugt at fasthalda endamálið við serundirvísing, sum stendur í § 21. Ráðleggingin av undirvísingini, herímillum valið av undirvísingar- og arbeiðsformum, háttum, undirvísingarmiðlum og evnum, skal megna tað, sum ásett er í endamálsgrein fólkaskúlans, og vera lagað til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum.

Í fjølmiðlunum og hjá politikarunum er/verður alsamt víst á tey alsamt vaksandi krøvini, ið verða sett til lesiførleika hjá ungum sum vaksnum, bæði tá tað snýr seg um útbúgving og ikki minst at fylgja við í KT-samfelagnum. Fyri at vera við í hesum, er heilt vist, at lesi- og skriviførleikin hjá tí

einstaka má verða raðfestur frammarlaga. Ein onnur treyt er, at tann einstaki skal brúka KT-útbúnaðin í sínum dagliga virksemi.

Tað skal tó sláast fast, at lesing, skriving og handfaring av KT ikki er einasta fortreyt. Ein undirvísing, sum tekur støði í tí, sum næmingurin er góður til, tað honum tørvar og har hann kann mennast, vil geva honum sjálvsálit, ágrýtin og ikki minst barlast til at fara í holt við eina útbúgving og seinni arbeiði.

Ein skal vita, at skal ein røkka einum máli, so er sjálvsálitið gott at hava. Evnini hava nógv at siga, men ikki alt. “ Tað blíðkar fyri hugaðum monnum ” sigur orðatakið, og tað man vera sannað so mangan.

Rákið kemur helst at verða sjónligari við tíðini. So hvørt sum KT kemur at gerast betri á lesi- og skriviøkinum, kemur hetta at hjálpa tí vánaliga lesaranum almikið, soleiðis at lesi- og skrivispjaðingin ikki verður so stór. Niðanfyri eru trý punkt, ið vit meta hava týdning.

- Ein skipað serundirvísing í lesing/skriving skal geva framburð og nøgdsemi hjá næminginum. Undirvísingin skal ikki minka um sjálvsvirðið og sjálvhjálpnið hjá næminginum.
- Tøknin verður brúkt í øllum undirvísingarhøpi, bæði sum tað góða undirvísingarambоðið í lesing/skriving og sum stuðul – hjálparamboð.
- At tøknin verður brúkt til fulnar, og at næmingurin við lesitrupulleikum lærir at brúka hana, soleiðis at amboðið verður brúkt í seinni útbúgving og arbeiði.

## Vanlig undirvísing í mun til tillagaða undirvísing:

Erik Arndal, pedagogiskur ráðgevi, sigur tað so væl í greinini niðanfyri – Læseundervisning i fremtidens digitale Danmark.

*Som eksempel på ”forudsætning ved skolegangens ophør” vil jeg tegne to billeder af læseklasser på 9.-10. klassetrin for elever med svære specifikke læsevanskeligheder (ordblinde). I begge klasser har eleverne gennem adskillige år modtaget særlig tilrettelagt undervisning, men deres nuværende læseniveau er trods dette testet til 2-3 klassetrin. I den ene klasse læser eleverne mange bøger og primært Dingobøger el. lign., hvor lixtal og oftest også indhold svarer til deres læsenivau. Der bruges ikke computer i undervisningen, de koncentrerer sig om træning i afkodning af tekster.*

*I den anden klasse læser eleverne primært alders- og indholdsrelevante tekster bl.a. på internet. Skøn- og faglitteraturtekster scannes ind på computeren. De elektroniske tekster kan læses op med syntetisk tale, så elevens læsning af ord og sætninger, han ikke selv magter, støttes. Undervisningen koncentrer sig om indholdsforståelse og indholdsvurdering.*

*Flere elever fra begge klasser skal få måneder senere starte på Teknisk Skole, men de er blevet givet vidt forskellige forudsætninger. Forudsætninger, der er med til at definere elevernes fremtidige læse- og personlige kompetence, samt deres muligheder for at tackle egen læring.*

*I den første klasse har den skjulte læring været, at læsning er kedeligt. Og at eleverne ikke magter at læse meningsfyldte tekster. De er frataget selvstændigheden og selvtilliden, og selvtilliden på læseområdet er lav. Eleven ved, de vil få store problemer på Teknisk Skole. De håber dog på at kunne skjule deres læsehandicap og klare sig gennem uddannelsen vha. deres praktiske evner.*

*I den anden klasse har eleverne lært at tackle, forstå og vurdere alderssvarende og meningsfyldte tekster. De har lært at være selvhjulpne og anvende teknologiens muligheder. De ved, at de vil få svært ved teorien på Teknisk Skole, men ved også, at de kan få hjælp og støtte gennem computeren. De ved, at flere og flere tekster kan skaffes elektronisk, eller de kan indscanne dem selv. Dermed kan de få oplæst alle fagtekster, og de ved, at de på Teknisk Skole har mulighed for at søge hjælpemidler, de kender, og de er klar til at arbejde for at få dem.*

*Det er i den sidste klasse, at såvel folkeskolens formål som bekendtgørelsen om special-undervisning efterleves bedst, og det er eleverne herfra, der har de bedste "forudsætninger for fortsat uddannelse, erhvervsmæssig beskæftigelse eller anden beskæftigelse".*

*Skønt mulighederne var fuldt til stede i foråret 2000, er der desværre endnu ikke mange klasser som den sidste, mens den første klasse er mere almindelig. Eksemplerne viser selvfølgelig kun en lille del af den samlede undervisning, og selvom de til dels er tænkt og forenklede, er de ikke urealistiske.*

## Greining av at teksti:

Treytin fyri lesing og harvið framtíðar lesiætlanum vil broytast í einum KT-samfelagi. Ein kend greining av lesingini er, at Lesing = Greining x Skilja. Her er motivatiónin ein fortreyt fyri at fáa eitt gott úrslit. (Hygg hjá Mogens Jansen, 1997). Sum omanfyrinevnda danska dømi vísir, er motivatiónin sera týdningarmikil. Um motivatiónin hjá 9. floks næmingum ikki er til staðar at lesa Dingobøkur til 2. flokk, so hendir helst ein greining/skiljing. Men er hetta lesnaður, ið næmingum tørvar innihaldsliga? Afturímóti er tað kent, at um ein næmingur er motiveraður at lesa ein tekst, sum lærarin heldur er í so torførur, so kann hann tað sum einki.

At greina orð er millum annað ein partur av lesingini, ið sigur nakað um, hvussu ein sær bókstavin og orðið. Tað kann verða gjørt við ljóðmyndum frá stavum, samansettum stavum o.s.fr. ella kendum orðum, myndalesing.

Fyri at kunna skilja ein tekst, er neyðugt at taka innihaldið úr tí lisna. Hetta skal altíð gerast við støði í, hvat næmingurin skilur.

Vert er at minnast til, at um ein greining ikki verður gjørd, ein ikki skilur tað lisna og motivatiónin er lítil, so hevur ein faktiskt ikki lisið nakað yvirhøvur. Hetta er galdandi bæði fyri tekst á blaði og á teldu. Tað er neyðugt at kenna mun á at greina og at skilja – serliga, tá ið alt meira tekstur verður elektroniskur.

## Lesiætlan:

Møguleikin at fáa KT-hjálp til at greina ein tekst í eini lesiprosess er eyðsýndur og fevnir um broytta skrivtútsjónd, stødd á stavum o.s.fr. til upplestur av teksti. Samanumtikið kann ein ómetaliga orðblindur persónur fáa eina teldu at lesa ein og hvønn tekst upp. Í hesum førum kann lesing greinast sum: At lesa = Upplestur x Skilja. Upplestur er í hesum føri tað sama sum Greining.

Hjálp frá telduni fæst í greiningini av tekstinum, har teldan reint tekniskt lesur bókstavir og orð. Hetta er tó ikki altíð nóg mikið, tí fyri at kunna skilja tað upplisna, er eisini neyðugt við vitan fatan og fortreytum. Væntandi kemur hesin tátturin at hava enn størri týdning í tí skrivaða orðinum orsakað av tí stóru mongd av informatión, ið vit fáa yvir okkum dagliga.

At lesa vil í enn størri mun verða at finna, meta um og brúka informatiónina til at fáa vitan og førleika. Júst sum lesihátturin er ein partur av at fullnýta ta tøkni, ið lesingin er ein partur av.

Samanumtikið er neyðugt at leggja sær í geyma, at ein má hava hesar nýggju lesihættir í huga, soleiðis at ein kann brúka teir møguleikar, ið teldan hevur á tekniska økinum. Hetta verður ein týðandi táttur í komandi lesiundirvísing, serliga hjá teimum við lesitrupulleikum, tá ið um ræður upplestur av bókstavum og orðum. Hetta er lykilin til bakgrundsvitan, at skilja ein tekst, meta um hann og at brúka nýggja tøkni.

## KT-hjálparamboð:

Í framtíðarhøpi skal lærarin ikki uppfata telduna bert sum eitt hjálparamboð hjá lesi- ella skriviveikum næmingum. KT er/verður eitt hjálparamboð, júst sum einar brillur, skrivimaskinan, roknimaskinan ella fyri tann skuld ein heilt óskyldigur blýantur.

Tað at brúka teldu er ikki eitt mál í sær sjálvum, men tá hon verður brúkt nógv í arbeiði og frítíð til at lesa og skriva, er klárt, at eitt brúkbart mál er at brúka hana optimalt til hesa prosess.

At teldubrúkið í lesiundirvísingini økir um lesiførleikan, eisini á pappíri, er sjálvsagt ein góð grundgeving, og tað er heldur eingin ivi um, at eitt hjálparforrit gevur eina positiva ávirkan. Lesiserfrøðingurin Cartin Elbo skrivar soleiðis: ”....eleven hører ordet, og dermed bliver det lettere for ham eller hende at forstå teksten. Endnu væsentligere er det imidlertid, at langtidsundersøgelser har vist, at elever, som arbejder med computere med syntetisk talefeedback, får en hurtigere læseudvikling end elever, som bruger den samme tid på tradionel læseundervisning.“ (Elbo et al 1996, s6). Tað er tó bert, har eitt rímiligt tal av teldum eru atkomuligar, at tað kann lata seg gera at brúka t.d. syntetiska talu.

Forritini, ið verða brúkt í serundirvísingini til at lesa og skriva við, kunnu býtast í trý øki:

**1. Standardforrit:**

Vanlig forrit, sum fylgja við telduni, t.d. stýriskipan, tekstforrit, redigeringsforrit og tilhoyrandi hardvare so sum myndatól, video, ljóðupptøka, skannari, rokniark o.s.fr.

**2. Hjálparamboð:**

Hesi forrit eru vanlig forrit, ið eru ætlað til tann vanliga brúkaran, men eisini eru góð til serundirvísing. T.d. digital tala, syntetisk tala, prædiktionsprogramm (Iris), rættstavari og orðabøkur.

**3. Undirvísingarforrit:**

Her er serliga hugsað um forrit, ið eru ætlað til at venja ávís øki ella til at eggja næmingin til at arbeiða við ávísum evnum. Nógv forrit eru at velja ímillum, og lærarin má sjálvandi hugsa um, hvat er tað rætta. Øll eru ikki líka góð, og tey kosta ikki einki heldur.

Tað, vit hava nevnt her, fevnir nærum bert um at lesa og skriva vanligan tekst. Men menningin gongur líka so nógv ímóti KT, myndum, video o.s.fr., ið verður ein meira natúrligur partur av undirvísingini. Vit læra betur við at brúka fleiri sansir, og serliga teir bókliga veiku næmingarnir kunna fáa gleði av, at teldan við sínum multimediamøguleikum verður tikin við í undirvísingina. Hvussu menningin á hesum øki kemur at ávirka alla undirvísing, er ilt at spáa um, men einki er at taka seg aftur í, at tað kemur at hava stóra ávirkan á serundirvísingingina.

Vert er at minnast til, at í undirvísingini av lesi- og skriviveikum næmingum er neyðugt at síggja møguleikarnar í tí nýggju tøknini heldur enn forðingarnar. At læra er at menna okkum til framtíðina heldur enn til fortíðina. Eisini er neyðugt, at lærarar eru motiveraðir at fáa sær hollan kunnleika um telduna og møguleikar hennara, og at teir eru opnir og motiveraðir at brúka hana í undirvísingini.

**4 Hjálparamboð til multihandikappaðið:**

Her hugsa vit serliga um multihandikappaðar næmingar, ið ikki fáa brúkt eitt vanligt knappaborð ella vanliga mús fyri at orientera seg á einum telduskíggja.

Í tí dagliga arbeiðinum við multihandikappaðum næmingum hava vit mangan staðið spyrjandi. Hvussu fáa vit hesar næmingar, ið ofta eru sera illa fyri likamliga sum andaliga, meiri aktivar í tí dagliga? Nógvar royndir hava verið gjørdar við, men síðan teldan gjørdist atkomuligari, og forritini fleiri og brúkaravinarligari, hevur hon verið eitt gott undirvísingaramboð hjá teimum multihandikappaðu.

Til tíðir hava vit hildið, at skal næmingurin kunna brúka telduna aktivt, so krevst ofta okkurt serligt hjálparamboð. Oftani hevur hetta hjálparamboðið tó verið so serligt og framkomið, at trupult hevur verið at fingið tað tilpassað til brúkaran. Tá ið tað endiliga riggaði, ja, so bleiv tað í ólagi, ella lærarin fekk aðrar uppgávur. So var at byrja av nýggjum. Ein heldur óhaldbar loysn í longdini.

Í staðin hava vit brúkt vanligu telduna sum útgangsstøði og roynt at fingið brúkaran at brúkt hana í undirvísingini. Hetta gevur nógvar fyrimunir, tað er bíligt, haldbart, atkomuligt, tú kanst brúka allar teldur, líka mikið, hvar tú ert, og øll kenna ta vanligu telduna. Um hetta ikki er nóg mikið, so kann okkurt lítið hjálparamboð fáast, so sum 0-1 kontakt, Symbekey, serlig mús og aðrir smálutir.
Vit hava tey síðstu árini serliga brúkt hjálparamboðini Symbekey og 0 - 1 kontakt til eina serliga mús.

Symbekey er ein dós, sum verður sett millum knappaborðið og telduna. Á kassanum er møguleiki at seta níggju ymiskar 0 - 1 kontaktir til. Hvør kontakt kann programmerast til at verða ein ávísur tastur á knappaborðinum, og hon kann eisini stillast til, hvussu leingi hon skal vera niðri fyri at verða aktiverað. Fyrimunirnir eru ein einføld, stabil boks, allar 0 - 1 kontaktir kunnu brúkast, næmingurin kann ávirka níggju ymisk ting, og lætt er at flyta Symbekey og kontaktir til aðra teldu.

Nú vit hava talgildað bókina Hervør og Høgna við forritinum Mediator, kunnu vit síggja ymiskar møguleikar við Mediator og Symbekey. Hesir møguleikar eru sjálvsagt ætlaðir til multihandikappaðar næmingar, ið ikki klára at brúka aðrar navigatiónsmøguleikar, sum t.d. forrit frá Iris.

Við Mediator ber til at programmera ávísan hotspot til at vera ávísur knøttur á knappaborðinum, og við Symbekey eru níggju valmøguleikar at brúka 0 – 1 kontaktir.
Samanumtikið kann komast rættiliga langt við forritinum Mediator og hjálparamboðinum Symbekey. Her veldst um hugflog og áræði.

# Niðurstøða

Hesa tíðina, ið vit hava arbeitt við at talgilda partar av lesibókina Hervør og Høgni, og hava lisið bókmentir um evnið: lesing og edv, er okkara hugburður til telduna sum undirvísingaramboð, serliga til næmingar við serligum tørvi, vorðin nógv meira positivur enn áðrenn. Nú er eingin ivi í okkara sál longur, teldan eigur at verða eitt sjálvsagt amboð í allari undirvísing. Teldan skal verða eitt sjálvsagt amboð, tá ið vit sum undirvísarar og gera næmingatillagað tilfar.
Ein trupulleiki er, at skúlarnir hava alt ov fáar teldur, harumframt eru tær ikki nóg lætt atkomiligar hjá næmingunum. Mynduleikarnir eiga tí at geva skúlunum munandi fleiri teldur. Er ein næmingur við serligum tørvi, so skuldi tað veri sjálvsagt, at hann fekk lánt eina farteldu, um mett var, at hann kundi havt nyttu av henni.

Talgildað lesitilfar hevur fleiri fyrimunir fram um bókina. Okkara egnu royndir saman við ummælum av Hervør og Høgna bara styrkt okkum í trúnni á telduna, tá um undirvísing ræður.

**Kut úr ummælum**:
Næm er glaður at síggja kent tilfar á telduni, tað visuella telur nógv, næm. er aktivur og motiveraður, tilfarið er stuttligt, næm. er forvitin og so læra næm. at teldan kann brúkast til annað enn spæl.

- Teldan er motiverandi og næm. følir seg tídningarmiklan
- Tann ljósi skermurin fangar
- Teldan er tolin
- Næmingurin verður aktivur
- Lætt er at skriv og rætta og at fáa eitt vakurt úrslit
- Tala kann setast til tekstin,  bæði setningar og einstøk orð

- Lætt er at skanna myndir
- Digitalt kamera til myndir
- Animatiónir kunnu gerast
- Møguleiki fyri at hála, samanbera, orð og myndir
- Hot spot
- Aktivir knøttar sum hava samband við annað tilfar
- At scanna seg til rætta mynd av fleiri
- Tilfar kann lætt takast frá alnótini og setast inn

Samanumtikið er talgildaða tilfarið nógv meira livandi og motiverandi enn tilfarið í bókini, næmingurin og serliga hann við serligum tørvi verður meira positivur, og hann hevur lættari við at verða aktivur og fær av somu ársøk meira sjálvsálit.

Tað verður ein stór uppgáva hjá okkum, sum telduvørðar, at motivera okkara starvsfelagar til, at teir kunnu sýggja telduni sum eitt veruligt undirvísingaramboði. Hetta gerst best við at geva lærarum góða og holla vitan vitan um hvørjir møguleikar teldan hevur. Um lærarar ikki hava eina holla vitan um telduna, so kann hon ongantí koma til sín rætt.

Vit halda okkum hava prógvað, at lærarar saktans kunnu gera brúkiligt teldutøkt tilfar, heilt frá einkultum myndum við teksti og talu til ”livandi” multimediatilfar við spennandi uppgávum. Er viljin til steðar at brúka telduna so kann komast langt. Upplagt er, at lærarar sita í bólki, toymum, og gera tilfar og leggja til rættis undirvísingina.

Upphavsrætturin hevur ofta verið uppi og vent hjá okkum, men vit eru samdir um, at tá lærarar tillaga undirvísingartilfar til egna nýtslu, stenst helst eingin trupuleiki av hesum. Samanumtikið er talgildaða tilfarið nógv meira livandi og motiverandi enn tilfarið í bókini, næmingurin og serliga hann við serligum tørvi verður meira positivur, og hann hevur lættari við at verða aktivur og fær av somu ársøk meira sjálvsálit.

# Keldur:

**Karstin Elbro:**

Læsevanskeligheder – væsentlige årsager og muligheder i undervisningen (Svage læsere og edb).

**Jytte Jordal:**

Computere i undervisningen af læse og stavehæmmede. (Svage læsere og edb)

**Øjvind Brøgger:**

Svage læsere og edb

**Erik Arndal med flere:**

Specialundervisning i læsning

**Gunvor Damsby, Lund:**

Computeren som pædagogisk hjælpemiddel til elever med alvorlige læse – og skrivevanskeligheder. (Svage læsere og edb).

**Greinir úr HIT blaðnum:**

**Erik Arndal:**

Læseundervisning i fremtidens Danmark

Så inddrag dag IT i undervisningen

**Delle Dall:**

En computer med det hele, tak.

**Halgerð A. Hansen:**

Kunningartøkni í fólkaskúlanum

Hugleiðingar og viðmerkingar í samband við at brúka teldu í byrjunarundirvísing í lesing.